ÚTLANDIÐ

## Flogfeløg hava trupulleikar

Hørð kapping, ov stórt útboð og dýrt brennievni gera, at nógv flogfeløg hava ilt við at fáa endarnar at røkka saman.

Trupulleikarnir eru serliga stórir í USA. Herfyri noyddist American Airlines at hækka ferðaseðla-prísirnar fyri at bøta eitt sindur um raksturin, men stjórin, Gerard Aprey, sigur, at tað átti felagið at havt gjøt fyri hálvum øðrum ári síðani. Hann sigur, at tað dýra brennievnið fer at kosta felagnum 1,4 milliard dollarar meiri í ár enn í fjør, heldur oljuprísurin sær, og hesum hevur felagið ikki lagt upp fyri, sigur hann.

Ein annar trupulleiki hjá teimum amerikonsku flogfeløgunum er, at tey skylda meiri enn teirra evropeisku kappingarneytar, og harafturat hevur tað víst seg at vera at kalla vónleyst hjá feløgunum at fáa starvsfólkini at góðtaka sparingar.

## Ónæriligur dómari

Svenska løgreglan fer fyrsta dagin at avhoyra ein av dómarunum í Hægstarætti, tí løgreglan vil vera við, at dómarin hevur brotið lógina, sum bannar fólki at keypa sær tað, sum løgreglan kallar "kynsligar tænastur".

Sambært blaðnum Expressen bleiv ólevnaðurin hjá dómaranum avdúkaður, tá løgreglan kannaði eitt annað mál. Í tí málinum hevði ein 30 ára gamal maður meldað ein ungan skúladrong fyri stuldur. Tá løgreglan kannaði málið, kom hon eftir, at maðurin og drongurin vóru komnir í samband við hvør annan ígjøgnum eina heimasíðu hjá samkyndum. Tað vísti seg, at drongurin hevði fingið pengar frá fleiri monnum aftur fyri at hava veitt teimum "kynsligar tænastur", og tá løgreglan fór at kanna nøvnini á monnunum, kom hon fram á navnið á hægstarættardómaranum.

Málið er myrkalagt, men ein kelda sigur við Expressen, at málið kann vísa seg at vera tað mest álvarssama innan svenska rættarverkið í mong ár.

## Søguligt svørð á ferð

Í august eru 700 ár liðin, síðani onglendingar avrættaðu skotsku frælsishetjuna William Wallace, sum fleiri munnu kennast við frá filminum "Braveheart", sum Mel Gibson gjørdi í 1995 við sær sjálvum sum høvuðsleikara.

Í tí sambandi hava myndugleikarnir í Stirling í Skotlandi gjørt av, at svørðið hjá William Wallace kann sýnast fram á einum hátíðarhaldi, sum verður í New York í næstu viku. Hetta er fyrstu ferð, at skotar eru gingnir við til at lata tann søguliga dýrgripin fara av landinum.

Svørðið, sum er úr stáli, er 1,52 metur langt og vigar 2,7 kilo. Tað er ímillum lutirnar, sum eru á savninum Wallace Monument, sum stendur á staðnum, har William Wallace og menn hansara vunnu á onglendingum í bardaganum um Stirling Bridge í 1297. Áðrenn svørðið kom hagar, hevði tað verið á borgini Dumbarton Castle í 600 ár.

## Kommunu-stríð

Avgerðin hjá donsku stjórnini at leggja kommunurnar saman í størri eindir hevur elvt til øði í kommununi Værløse á Sælandi, tí har vilja fólk ikki hoyra talan um, at kommunan skal leggjast saman við grannakommununi Farum.

Støðan hevði ivaleyst verið øðrvísi, um Værløse skuldi leggjast saman við onkrari aðrari grannakommunu, men trupulleikin við Farum er, at tann kommunan skyldar meiri enn tríggjar milliardir krónur, og ta skuldina ætla fólk í Værløse sær ikki at gjalda. Tey hava tí kravt, at Lars Løkke Rasmussen, innanríkisráðharri, skal broyta avgerðina, so Værløse framvegis verður ein sjálvstøðug kommuna, men tað vil ráðharrin ikki. Ístaðin fyri hevur hann sagt, at borgararnir í Værløse og Farum kunnu fáa tvey ymisk skattaprosent.

Men tað vil býráðið í Værløse ikki góðtaka, og tað hevur nú fingið eina sakførarafrágreiðing, sum sigur, at tað er ólógligt at noyða tvær kommunur at leggja saman. Um tað er nóg mikið til at fá ráðharran at broyta støðu er ein onnur søga.



*Jordanski yvirgangsmaðurin Abu Musab al-Zarqawi er ein av fremstu monnum Osama bin Ladens. Nú hóttir hann Evropa*

*Mynd: Reuters*

# Nú hóttir hann Evropa

**Sambært týsku fregnrtænastuni fyrireikar yvirgangsleiðarin Abu Musab al-Zarqawi álop á mál í Evropa**

YVIRGANGUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hann er eftirlýstur í Jordan, hann er eftirlýstur í Irak, og amerikanararnir eru sinnaðir at gjalda næstan 150 milliónir krónur fyri at fáa fatur á honum, sama um hann er livandi ella deyður.

Maðurin eitur Abu Musab al-Zarqawi, og amerikanararnir ivast ikki í, at tað er hann, sum hevur skipað fyri teimum flestu atsóknunum at irakum og og útlendskum hermonnum í Irak. Hann hevur eisini skipað fyri fleiri burtuflytingum og hevur sjálvur avrættað minst ein gísla.

Nú hóttir hann eisini Evropa, skrivar tað viðurkenda týska tíðarritið Cicero. Blaðið hevur fingið at vita frá einari keldu í týsku fregnartænastuni BND, at al-Zarqawi fyrireikar eitt álop við evnafrøðiligum vápnum.

- Vit vita, at hann arbeiðir við málinum, sigur keldan við Cicero.

Sambært teimum týsku fregnartænastukeldunum roynir al-Zaeqawi at útvega sær evnafrøðilig vápn í Georgia og í Norðurkaukasus. Keldurnar vilja vera við, at hann hevur einar 150 viðhaldsmenn í Evropa, og sambært BND hava nakrir teirra verið virknir í týska landspartinum Baden-Wúrttemberg.

# Serfrøðingar undrast á at eingin flóðalda kom

**Flóðalduserfrøðingar duga ikki at skilja, hví tann harði jarðskjálvtin seinasta mánadag ikki elvdi til nakra flóðaldu**

JARÐSKJÁLVTI

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hvussu ber tað til, at jarðskjálvtin, sum bleiv máldur til 8,7 á Richter-talvuni, ikki elvdi til eina flóðaldu?

Tað er spurningurin, sum altjóða viðurkendir flóðalduserfrøðingar seta sær sjálvum og hvør øðrum í hesum døgum, tí teir ivaðust ikki í, at skjálvtin seinasta mánadag fór at elva til eina næstan líka stóra flóðaldu sum hana annan jóladag.

- Tað undrar meg stórliga, at ein so harður jarðskjálvti ikki elvdi til eina flóðaldu nærhendis miðdeplinum, sigur jarðfrøðingurin og flóðalduserfrøðingurin Robert Cessaro á amerikanska ávaringarstovninum Pacific Tsunami Warning Center á Hawaiioyggjunum við tíðindastovuna AP.

Stjórin á stovninum, Charles McCreery, sigur, at ein jarðskjálvti, sum er harðari enn 8,0 á Richtertalvuni, elvir vanliga til eina rættiliga stóra flóðaldu, og at hann og hansara fólk væntaðu eina rættiliga stóra flóðaldu mánadagin. Tí ávaraði støðin á Hawaiioyggjunum londini við Indiska Havið um, at ein flóðalda kundi vera á veg.

Charles McCreery sigur við AP, at tilburðurin mánadagin vísir, at enn kann vísindin ikki siga við vissu, nær ein jarðskjálvti undir havbotninum kann elva til eina flóðaldu.